SPEKT løggildir grannskoðarar

# Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum

Ársroknskapur fyri 2014

## INNIHALDSYVIRLIT


| | SÍÐA |
|---|---|
| UPPLÝSINGAR UM KIRKJULIGU HEIMAMISSIÓNINA Í FØROYUM | 2 |
| LEIÐSLUFRÁGREIÐING | 3 |
| ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR | 4 |
| ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA | 5 |
| NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR | 6 |
| RAKSTRARÚRSLIT | 8 |
| FÍGGJARSTØÐA | 9 |
| NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN | 11 |

# UPPLÝSINGAR UM KIRKJULIGU HEIMAMISSIÓNINA Í FØROYUM

Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum
FO-437 Nesvík

Telefon 47 00 00
Telefaks 47 00 01

Heimstaður: Nesvík

Heimasíðs: www.mission.fo
t-post bústaður: hm@mission.fo

**Aðalskrivari**
Øssur Kjølbro

**Fíggjarleiðari**
Ata Jacobsen (í farloyvi)
Gunnar K. Nattestad

**Høvuðsstýrið**
Símun Persson Jacobsen, formaður
Mariann Djurhuus Poulsen, næstformaður
Jan Johannesen, 2. næstformaður
Óli Marner Christiansen
Jógvan Dam
Leila Højgaard
Ragnar Groth Mortensen
Karl Michaelsen
Hilmar Danielsen
Suni Justinusssen

**Grannskoðari**
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## Ársúrslitið

Ársúrslitið, eftir avsetingar til ávís endamál og avskrivingar, er upp á 353.447 kr. í mun til eitt avlop upp á 123.933 kr. undanfarna ári.

## Framtíðarvánir

Leiðslan metir, at úrslitið komandi ár fer at javnviga.

## Peningaviðurskifti

Fíggjarstøðan javnvigar við 15.362.889 kr. Eginpeningurin er 684.617 kr., svarandi til 4%.

## Býtið av úrslitinum

Skotið verður upp, at ársúrslitið, 353.447 kr., verður flutt á Trygdaravsetingina.

## ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

Høvuðsstýrið hevur í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við galdandi roknskaparreglur. Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2014, umframt av úrslitinum av virksemi felagsskapsins fyri roknskaparárið 2014.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar ársaðalfundsins.

Tórshavn hin 9. mars 2015

| Aðalskrivari: | Fíggjarleiðari: |
|---|---|
| Øssur Kjølbro | Gunnar K. Nattestad |

Høvuðsstýrið:

| | | |
|---|---|---|
| Símun Persson Jacobsen<br>*formaður* | Mariann Djurhuus Poulsen<br>*næstformaður* | Jan Johannesen<br>*2. næstformaður* |
| Óli Marner Christiansen | Jógvan Dam | Leila Højgaard |
| Ragnar Groth Mortensen | Karl Michaelsen | Hilmar Danielsen |
| Suni Justinussen | | |

Hesin roknskapur er framlagdur og góðkendur av ársaðalfundinum hjá Kirkjuligu Heimamissiónini í Føroyum

hin ____________________ 2015

____________________________

(fundarstjóri)

# VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

## Til høvuðsstýrið í Kirkjuligu Heimamissiónini í Føroyum

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Kirkjuligu Heimamissiónini í Føroyum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2014 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagsskapurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Ein grannskoðan ber eisini í sær, at mett verður, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2014 og av úrslitinum av virkseminum hjá Kirkjuligu Heimamissiónini í Føroyum í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2014 samsvarandi ársroknskaparlógini.

Tórshavn hin 9. mars 2015
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Mirjam Haraldsen
*statsaut. revisor*

## NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR

Ársroknskapurin fyri Kirkjuligu Heimamissiónina í Føroyum er gjørdur eftir ásetingunum í ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki A. Nýttu roknskaparreglurnar eru óbroyttar í mun til undanfarna ár.

**Um innroknan og virðisáseting í ársroknskapinum**
Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagsskapurin fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagsskapurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar. Útreiðslur nýttar til at røkka ársins inntøku verða tiknar við í rakstrarroknskapin.

**Inntøkur**
Inntøkur frá gávum og innsavningum verða tiknar við í rakstarroknskapin, tá ið hesar verða latnar, meðan inntøkur frá sølu av vørum og tænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, um fakturering er farin fram áðrenn árslok.

**Útreiðslur**
Útreiðslur verða rakstrarførdar í tí ári tær viðvíkja.

**Fíggjarligar inntøkur**
Rentuinntøkur og kursjavningar av undirliggjandi ognum í sambandi við avsetingar, verða ikki inntøkuførd í rakstrinum, men beinleiðis á avsetingarkontur.

**Fíggjarligar útreiðslur**
Í tann mun Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum fær peningagávur, sum eru eyðmerktar til ávís tiltøk, verður ein tilsvarandi upphædd rakstrarførd til endamálið. Er talan um størri nýútveganir, har innsavnað verður yvir longri tíðarskeið, verða upphæddirnar fluttar í avseting til peningurin verður nýttur.

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður virðissett til útveganarprís við frádrátti av samlaðum gjørdum avskrivingum. Leguhúsið og spæliplássið hava verið avskrivað við somu upphædd sum lániskuldin í ávikavist leguhúsinum og spæliplássinum hevur verið niðurgoldin við. Nú ið øll skuldin er goldin, eru leguhúsið og spæliplássið fult út avskrivað.

## NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR

Onnur støðisogn verður avskrivað við eins stórari upphædd tey einstøku roknskaparárini. Avskrivingartíðarskeiðið er ásett út frá væntaðu brúkstíðini.

Tey nýttu avskrivingartíðarskeiðini eru:

| | |
|---|---|
| Leguhúsið | Fult út avskrivað |
| Spælipláss | Fult út avskrivað |
| Tøkniogn | 3 ár |
| Innbúgv | 3 ár |
| Onnur rakstrargøgn | 4 ár |

Í tann mun talan er um tilgongd, har tað í undanfarnum árum er gjørd ein avseting til endamálið, verður upphæddin tikin burtur av avsetingini. Upphæddin verður víst sum ein tilgongd og straksavskriving í notuni fyri materiella støðisogn.

**Vørugoymslur**
Vørugoymslur verða upptiknar til útveganarprís, ella til nettusøluvirði, um hetta er lægri. Útveganarprísurin verður gjørdur upp eftir FIFO-háttinum. Egnar útgávur verða avskrivaðar yvir 3 ár.

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum.

**Virðisbrøv**
Virðisbrøv, ið eru tikin við sum ogn í umferð, verða virðisásett til kursvirðið við roknskaparlok.

**Skuld**
Onnur skuld verður virðissett til nettorealisatíónsvirði.

**Tíðaravmarkingar**
Tíðaravmarkingar, ið eru tiknar við sum skuld, fevna um móttiknar gjaldingar viðvíkjandi inntøkum í komandi roknskaparári.

## RAKSTRARÚRSLIT FYRI ÁRIÐ 2014

| Nota | | | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|---|
| | | | kr. | kr. |
| | **Inntøkur** | | | |
| | Fastar gávur | | 2.586.224 | 3.118.832 |
| | Innsavningar | | 576.648 | 495.881 |
| | Gávur | | 261.101 | 308.665 |
| | Søla av vørum | | 2.322.958 | 2.082.535 |
| | Søla av tænastum | | 1.552.317 | 1.593.729 |
| | Onnur søla | | 21.371 | 52.836 |
| | Inntøkur, serlig tiltøk | | 309.974 | 289.921 |
| | Rentur | | 2.451 | 3.639 |
| | Útreiðslur, tiltøk | -1.284.247 | | |
| | Inntøkur, tiltøk | 1.452.785 | 168.538 | 126.748 |
| | **Inntøkur til samans** | | 7.801.582 | 8.072.786 |
| | **Útreiðslur** | | | |
| | Fyrisiting | | -397.011 | -412.679 |
| 1 | Starvsfólkakostnaður | | -4.291.922 | -4.852.190 |
| | Aðrar vanligar útreiðslur | | -1.141.542 | -1.012.614 |
| | Keyp av vørum | | -1.352.724 | -1.408.177 |
| | Keyp av tænastum | | -171.933 | -140.713 |
| | Annað keyp | | -33.750 | -32.500 |
| | Fíggjarligar útreiðslur | | -6.549 | -5.575 |
| | **Útreiðslur áðrenn avskrivingar v.m.** | | -7.395.431 | -7.864.448 |
| | Staðfest tap upp á skuldarar | | 248 | -2.754 |
| 2 | Avskrivingar o.t. | | -52.952 | -81.651 |
| | **Avskrivingar v.m. til samans** | | -52.704 | -84.405 |
| | **Útreiðslur til samans** | | -7.448.135 | -7.948.853 |
| | **Úrslit** | | 353.447 | 123.933 |

Skotið verður upp, at úrslitið verður flutt í Trygdaravseting.

## FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2014

| Nota | | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| | **OGN** | | |
| | **Støðisogn** | | |
| 2 | **Materiell støðisogn** | | |
| | Bygningar | 0 | 0 |
| | Spælipláss | 0 | 0 |
| | Tøkniogn | 76.522 | 96.834 |
| | Innbúgv | 0 | 0 |
| | Onnur rakstrargøgn | 0 | 0 |
| | | 76.522 | 96.834 |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | **Vørugoymslur** | | |
| | Vørugoymsla, HMF | 306.022 | 253.868 |
| | Vørugoymsla, LH | 22.806 | 22.806 |
| | | 328.828 | 276.674 |
| | **Áogn** | | |
| | Skuldarar | 831.217 | 598.485 |
| | Mvg-áogn | 137.897 | 0 |
| | | 969.114 | 598.485 |
| 3 | **Ognir avsettar til ávís endamál** | | |
| | Tøkur peningur | 12.858.568 | 9.506.511 |
| | Lánsbrøv | 0 | 5.522.343 |
| | Tíðargreinaðar rentur av virðisbrøvum | 0 | 124.203 |
| | | 12.858.568 | 15.153.057 |
| | **Tøkur peningur** | | |
| | Tøkur peningur | 1.129.857 | 1.171.818 |
| | **Ogn í umferð til samans** | 15.286.367 | 17.200.034 |
| | **OGN TIL SAMANS** | 15.362.889 | 17.296.868 |

## FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2014

| Nota | | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| | **SKYLDUR** | | |
| | **Eginpeningur** | | |
| | Eginpeningur 1. januar | 684.617 | 684.617 |
| | Flutt frá ársúrslitinum | 0 | 0 |
| | **Eginpeningur til samans** | 684.617 | 684.617 |
| 3 | **Avsetingar** | | |
| | Avsett til ávís endamál | 12.858.568 | 15.153.057 |
| | Ársúrslit flutt í Trygdaravseting | 353.447 | 123.933 |
| | **Avsetingar til samans** | 13.212.015 | 15.276.990 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 476.979 | 415.492 |
| | Aðrir ognarar | 100.000 | 100.000 |
| | Avsett til skylduga frítíðarløn | 366.276 | 366.276 |
| | Tíðaravmarkingar | 523.002 | 440.509 |
| | Mvg-skuld | 0 | 2.984 |
| | | 1.466.257 | 1.325.261 |
| | **Skuld til samans** | 1.466.257 | 1.325.261 |
| | **SKYLDUR TIL SAMANS** | 15.362.889 | 17.296.868 |
| 4 | **Eventualskyldur og veðsetingar** | | |

## NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

### 1 Starvsfólkakostnaður

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Starvsfólkalønir | 3.496.212 | 3.924.847 |
| Eftirlønir | 456.588 | 517.840 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 140.233 | 152.708 |
| Annar starvsfólkakostnaður | 198.889 | 256.795 |
| | 4.291.922 | 4.852.190 |

Í roknskaparárinum hevur talið av starvsfólkum verið 14. Til samanbering kann nevnast, at í 2013 vóru eisini 14 starvsfólk.

### 2 Materiell støðisogn

| | Bygningar | Spælipláss | Tøkniogn | Innbúgv | Onnur rakstrartól |
|---|---|---|---|---|---|
| Salda 1. januar 2014 | 5.596.540 | 455.646 | 428.725 | 163.796 | 797.786 |
| Javningar undanfarin ár | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Frágongd (burturbeining) | 0 | 0 | -138.896 | 0 | 0 |
| Tilgongd frá avsetingum | 1.833.323 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tilgongd | 0 | 0 | 32.640 | 0 | 0 |
| | 7.429.863 | 455.646 | 322.469 | 163.796 | 797.786 |
| Avskrivingar 1. januar 2014 | -5.596.540 | -455.646 | -331.891 | -163.796 | 797.786 |
| Javningar undanfarin ár | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Avskrivingar av burturbeindum ognarlutum | 0 | 0 | 138.896 | 0 | 0 |
| Avskrivingar viðv. Avsetingum | -1.833.323 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Avskrivingar | 0 | 0 | -52.952 | 0 | 0 |
| Avskrivingar 31. desember 2014 | -7.429.863 | -455.646 | -245.947 | -163.796 | 797.786 |
| Salda 31. desember 2014 | 0 | 0 | 76.522 | 0 | 0 |
| Verður avskrivað yvir | - | - | 3 ár | 3 ár | 4 ár |

## 3 Avsett til ávís endamál

| | Saldur primo | Flutt frá ársúrslitinum | Renta, kurtasja og kurs-javningar | Brúkt úr avseting | Saldur ultimo |
|---|---|---|---|---|---|
| Avseting til Altjóða Missión | 190.014 | 0 | 0 | 0 | 190.014 |
| Avseting til bókaútgávu | 150.809 | 0 | 0 | 0 | 150.809 |
| Avseting til menning av Leguhúsinum | 125.854 | 0 | 0 | -3.826 | 122.028 |
| Avseting til serlig endamál í Vestmanna | 211.103 | 0 | 0 | -29.575 | 181.528 |
| Trygdargrunnur | 1.844.457 | 353.447 | 4.405 | -586.964 | 1.615.345 |
| Avseting til útbygging av Leguhúsinum | 12.754.753 | 0 | 30.861 | -1.833.323 | 10.952.291 |
| | 15.276.990 | 353.447 | 35.266 | -2.453.688 | 13.212.015 |

Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum fekk í 2007 pening á kontu í sambandi við søluna av Tórshavnar Sjómansheimi. Dagliga leiðslan hevur samtykt at leggja ein stóran part av upphæddini í avseting til útbygging av leguhúsinum í Nesvík, meðan restin er lagt í Trygaravseting. Leiðslan hevur valt ikki at inntøkuføra rentur og kursjavningar av undirliggjandi ognum í rakstrinum, men at bóka hesar rentur beinleiðis sum inntøkur á avsetingarkontur.

## 4 Eventualskyldur og veðsetingar

Ongar veðsetingar hvíla á felagnum.